## Jóanes í donskum biografum

Filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir "Sporini vaksa úr orðum", filmurin um rithøvundin Jóanes Nielsen, verður í næstum sýndur í Danmark. Filmurin varð frumsýndur á Tjóðpalli Føroya 3. desember í fjør og fekk góð ummæli í Sosialinum og í Studio2 í Kringvarpinum. Nú fáa danir og útisetar høvi at síggja filmin og at heilsa upp á Jóanes, sum verður til staðar á sýningunum. Sýningarnar í verða á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn hósdagin 18. februar kl. 20.00 á Norðuratlantsbryggjuni og í bioagrafinum Øst for Paradis í Århus leygardagin 20. februar kl-16.30.



## Lundin í rættin

Klokkan 8.15 í dag byrjaði rættarmálið, har Peter Lundin hevur ákært Piu Kjærsgaard fyri ærumeiðing. Tað ger hann, eftir nøkur óheppin orð frá politikarunum í Go'Morgen Danmark 19. Februar í fjør. Orðini hjá Piu Kjærgaard fullu drápsmanninum fyri brósti, og hann krevur nú 100.000 krónur í endurgjaldi. Pia Kjærgaard verður ikki sjálv til staðar í rættinum. -Eg skal verja hennara mál. Hon hevur onnur ting at gera í dag, sigur sakførari hennara Peter Trudsø. Hetta er ikki fyrstu fer, at Lundin hevur kent seg órætt viðfarnan. Í 2005 legði Lundin sak móti Dagbladet Information. Í tí førinum kravdi hann 25.000 krónurí endurgjaldi, tí blaðið nevndi hann sum psykopat. Men tað eydnaðist ikki honum at vinna hetta rættarmálið.

# Tvær milliardir fyri Bakkafrost

**Ein imponerandi inntjening, framúr úrslit og sterkur solvensur. Tað eru hugtøkini, sum verða nýtt, tá norska Finansavisen skrivar um fíggjarligu støðuna hjá Bakkafrost**

VINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Takkað verið strangari góðskustýring av fiskaheilsuni kann Bakkafrost í dag framleiða laks munandi bíligari enn kappingarneytarnir á norska marknaðinum*

»Knalltal og null lus«

Soleiðis skrivar norska Finansavisen um Bakkafrost av Glyvrum, sum í løtuni fyrireikar seg til skráseting á norska virðisbrævamarknaðinum.

Og tað eru ikki smávegis upphæddir, sum eru í væntu, tá felagið skal skrásetast.

Sambært norska blaðnum bendir úrslitið á, at samlaða kursvirðið fer at liggja nakað omanfyri tvær milliardir norskar krónur, og við hesum verður Bakkafrost størsta føroyska fyritøkan á marknaðinum.

Fyrst og fremst leggur blaðið dent á góðu inntjeningina, sum Bakkafrost hevur. Lutfallið millum ovastu og niðastu linjuna í roknskapinum – altso umsetning og ársúrslit – er góð 18%. Og tað er nakað langt omanfyri tað, sum norskir alarar kunnu vísa á. Fyrst og fremst tí góða sjúkustýringin hjá føroyskum alarum ber við sær, at hvørt kilo av laksi hjá Bakkafrost verður framleitt fyri einar 4-5 krónur minni enn tað, sum norskir alarar kunnu framleiða sama fisk fyri.

Bakkafrost legði tann 1. januar í ár saman við Vestlaks, og gjørdist við hesum ein av størstu alifyritøkunum í heiminum. Føroya Banki eigur í dag 33,6% av fyritøkuni, og tann parturin skal ætlandi seljast, tá fyritøkan verður skrásett á partabrævamarknaðinum.

# Skúvoyarleiðin verður boðin út

**Í sambandi við ein munnligan fyrispurning frá Bjørt Samuelsen, tingkvinnu, boðaði Jóhan Dahl, Landsstýrismaður, í gjár frá, at farmaleiðin til Skúvoyar verður boðin út**

SAMFERÐSLA
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Strandfaraskip landsins hevur seinastu tíðina roynt ein bát - Comrade - at sigla við farmi til Skúvoynna. Skúvoyingar hava ikki verið serliga fegnir um ætlanina at seta Comrade inn fyri Rituna, nú hon er farin í aðra sigling. Hetta hevur bygdarráðið í skrivi til landsstýrismannin gjørt greitt.

Tí spurdi tingkvinna Tjóðveldisins um hví júst Comrade var valdur at royna til siglingina, og um landsstýrismaðurin kundi garantera, at hetta er ein eins góð loysn og Ritan at røkja farmflutningin til og úr oynni. Hetta hevur lansstýrismaðurin nevniliga lovað skúvoyingum.

Landsstýrismaðurin boðaði frá, at hann í dag hevur givið Strandferðluni boð um, at farmasiglingin til Skúvoyar skal bjóðast út. Hetta fyri at sleppa undan misteinkiligering, tí tað er ein vinmaður hjá landsstýrismanninum, sum eigur Comrade, upplýsti landsstýrismaðurin fyri tinginum í dag.

Jóhan Dahl lovaði eisini, at loysnin, sum kemur, ikki verður ein verri tænasta enn tann Ritan hevur veitt.

# Klaksvíkingar í Samtaki

**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag hevur fingið limaskap í Samtaki**

FAKFELAG
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Mikudagin undirskrivaði Arthur Guðjónsson, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, undir limaskapsavtalu við Samtak, so nú eru fýra fakfeløg, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, limir í Samtaki.

Arthur Guðjónsson tók samstundis sæti í Samtak nevndini, har eisini Ingeborg Vinther, Hans Joensen og Jan Højgaard sita.

Limir í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag hava nú fingið somu limarættindi, sum hini limafeløgini í Samtak hava. Eitt nú kunna limir í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag nú nýta ókeypis løgfrøðiligu ráðgevingina hjá Samtaki.

Samstundis sum limaskapsavtala við Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag varð undirskrivað, gjørdu tey eisini eina tryggingaravtalu um, at limir í teimum fýra fakfeløgunum frítt kunna arbeiða inni á økinum.

Feløgini í Samtak vóna, at onnur fakfeløg eru hugað at gerast partur av felagsskapinum.

Samtak var sett á stovn í apríl 2007, og umboðar umleið ein triðing av føroysku løntakarunum.



*Hans Joensen, Arthur Guðjónsson, Jan Højgaard og Ingeborg Vinther manna nú toppin í føroysku fakfelagsrørsluni*